


# NÚ LATA VIT UPP Í VESTMANNA

## STARVSFÓLK TIL HANDILIN OG TIL GOYMSLUNA

Vit leita eftir dugnaligum starvsfólkum at taka sær av handlinum og goymsluni í Vestmanna. So hevur tú hug at gerast partur av einum spennandi arbeiðisplássi, har tú hevur góðar arbeiðsfelagar og spennandi uppgávur at røkja, skuldi tú kanska roynt teg hjá okkum.

**Talan er um fleiri størv**, og umfata hesi vanligt goymsluarbeiði innan timbur og byggitilfar og arbeiði í Handlinum.

**Goymslufólkið** hevur um hendi alla røkt av goymsluni, herundir kundaavgreiðslu og vørumóttøku. Vit vænta, at tú hevur nakað av kunnleika til goymsluarbeiði og til byggitilfar sum heild, umframt at tú ert røkin og nærløgd/ur í tínum arbeiði.

**Arbeiðið í handlinum** fevnir um kundaavgreiðslu, vørumóttøku, røkt og annað fyrifallandi arbeiði í hesum sambandi. Vit roknað við, at tú á sama hátt sum omanfyri hevur nakað av royndum innan amboðshandil ella líknandi, at tú ert røkin og nærløgd/ur í tínum arbeiði, og at tú ert dugnalig/ur innan teldu á brúkarastøði.

Løn verður sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so send okkum nøkur orð um teg sjálvan. Umsóknarfreistin er týsdagin 27. mars kl. 12.00. Nærri upplýsingar um størvini fáast við at tosa við Jørmann Petersen á telefon 311250 ella senda teldupost til jp@timburhandilin.fo. Umsóknir skulu sendast til Timburhandilin, postboks 3038, 110 Tórshavn.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

---

TJALDURS APOTEK

## Hevur tú hug at gerast farmakonomur ?

Vit søkja eftir 4 næmingum at byrja 1. mai 2007 ella eftir nærri avtalu.

Ert tú áhugað/ur í apoteksarbeiði, kunnu vit bjóða eina spennandi og áhugaverda útbúgving.

Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum at:

- Læra um heilsu, heilivág og viðgerð við heilivági, hvørji evni eru í heilivágstilbúningum og hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.
- Læra at arbeiða saman við nógvum starvsfólki, at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambart galdandi lógum og reglum.
- Læra at geva viðskiftafólki okkara góða tænastu og leiðbeina í samband við útflýggjan av apoteksvørum.

Útbúgvingin er ein 3 ára lærutíð, ið fer fram ávíkavist á apotekinum og á Farmakonomskúlanum í Hillerød.

**Krøv til umsøkjaran:**
Umframt Students-, HH-, HF-, HT- ella Fiskivinnuskúlaprógv, er tað av týdningi at tú hevur eitt opið sinni og hug at arbeiða við fólki.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og arbeiðsroyndum, skal sendast til:
Tjaldurs Apotek,
Postboks 3010, 110 Tórshavn,
áðrenn 16. apríl 2007.

Meira fæst at vita um útbúgvingina á
www.apotek.fo
ella við at ringja á Tjaldurs Apotek
tlf. 34 11 00 og spyrja eftir Doru.



---

Lærlingur til

# Gamla Bókahandil

**Søkt verður eftir lærlingi til bókahandil okkara at byrja skjótast til ber.**

Vit bjóða tær eitt áhugavert starv í einum hugnaligum umhvørvi við nógvum spennandi møguleikum.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki er bangin fyri at taka eina eyka hond í, tá á stendur.

Lærutíðin við HH er 2 ár og við FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum har tú verður við til at menna okkara nýumvælda handil.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

**H. N. Jacobsens Bókahandil**
Postsmoga 55 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 36 · hnj@hnj.fo

H. N. Jacobsens BÓKAHANDIL

---

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Bústovnin Mýrivegur 13 í Klaksvík

Talan er um fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum. Arbeitt verður í morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktum. Starvið verður sett 1. mai ella eftir avtalu.

Ynskiligt er, at viðkomandi hevur vitan um autismu.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og avbjóðandi starv, sum millum annað fevnir um at menna og vegleiða húsfólkið í øllum tí, sum tey hava tørv á.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um Pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Vilt tú vita meir um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Juliannu Heimistovu, leiðara, á tlf. 216310.

**Umsókn:**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:
Bústovnin á Mýrivegi 13
700 Klaksvík
Stílað: Julianna Heimistovu, leiðari

**Umsóknarfreist: 16. apríl 2007**

**Les um onnur størv á www.naerverk.fo leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**